# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vøkstur heldur enn niðurlaging

Hesi orð kunnu hóskandi standa sum yvirskrift yvir eini politiskari fráboðan, sum allir flokkar í Tórshavnar býráð hava sent út og sum stóð sum tíðargrein her í blaðnum í gjár. Hetta er eitt áhugvert skjal, tí tað sigur nakað um tann hugburð, sum leiðslan í landsins størstu kommunu hevur til ta altjóða kreppu, sum alt meira er farin at gera um seg í Føroyum.

Ein slík kreppa kann verða taklað á mangan hátt. Ein kann velja at lata standa til, ella at høgga bremsurnar í ella í øllum førum tátta í almenna so væl sum privata geiran. Ein kann eisini velja ein meira ágangandi politikk alt eftir hvørji politisk grundajónarmið ein hevur. Úrslitini og ávirkanin á samlaða búskapin verður hareftir.

Tað er eygsýnt, at búskaparliga ávirkanin av virksem-inum í høvuðsstaðnum er stór av tí einføldu orsøk, at høvuðsstaðurin tekur so nógv pláss í samlaða virksmeminum í landinum. Tað er tí ikki líkamikið hvørja strategi, ið eitt býráð velur við atliti at mink-andi virkseminum í landinum og í umheiminum sum heild. Tað er í hesum høpi, at fráboðanin, ið nevnist Viljin til vøkstur skal síggjast. Við hesum skjali hevur býráðið í Tórshavn fráboðað, at ein ætlar at reka ein ekspansivan politikk, ein politikk, ið elvir til vøkstur heldur enn ein kontraktivan politikk, ið elvir til, at stígur kemur í virksemið í Suðurstreymoy.

Lat so vera, at henda politiska kós kemur at krevja lántøku, men hetta er ivaleyst at velja fram um einki at skylda, alt meðan kreppan bert stendur við og veksur við øllum teimum óhepnu avleiðingum, sum ein slík politisk kós hevur við sær. Nevnda fráboðan er eitt katalog ella ein skrá yvir øll tey øki, har neyðugt verður at seta inn og at menna til tess at uppihalda virkseminum í høvuðstaðnum. So vil tíðin vísa, hvørt tað fer at eydnast samgongu og andstøðu í Tórshavnar býráð at halda fast og fremja hesar ætlanir. Eydnast hetta, kunnu vit bert fegnast, miseydnast hetta, so hevur ein í hvussu er ikki sitið hendur í favn – ein hevur veruliga roynt at byggja borð fyri báru.

Sostatt hevur landsins størsta kommuna klárt og greitt meldað út við síni støðu og sínum grundleggjandi hugburði til kreppuna, og borgarar og vinnulív hava ein góða hóming av, hvat kann væntast frá kommun-ala geiranum í høvðusstaðnum. Hetta hevur í sjálvum sær eitt jaligt árin á vinnuliga umhvørvið og huglagið.

Sama kann tíverri ikki verða sagt um almenna geiran. Her má tíverri staðfestast, at útmeldingarnar úr Tinganesi eru bæði ógreiðar og mótstríðandi. Tað dregur út við tí kreppu og/ella vakstrarpakka, sum lovaður er. Hetta bendir á atgerðarloysi. Vit vita heldur ikki hvat, ið er í pakkanum, men dúgliga verðir gitt og er nakað um hesar gitingar, so draga landsstýrið og Havnar kommuna ikki somu línu. Tað sindrið, vit vita, bendir á ein táttandi og stramman fíggjar- og búskaparpolitikk, sum bert kann elva til enn minni virksemi í landinum. Her er talan um annan hugburð,  og so er spurningurin, hvør hugburður gagnar landi og fólki mest. Vit eru ikki í iva.

**Sosialurin**

## Opið bræv til Fíggjarmálaráðharran frá frítíðar felagnum Antares

**THOMAS LAMBASTEIN**
formaður -
Frítíðarfelag fyri fólk
í farmasigling og
frálandavinnu
www.Antares.fo

Tað var við sorgblídni, at vit lósu tíðindini sum vóru send út til skipini hin 23/6-2009

Har stóð millum annað, at skattur á 5% skuldi leggjast á DIS inntøkurnar, har skuldi staðið eyka-skattur á DIS inntøkuna.

DIS stendur fyri Dansk Internationalt Skipsregister og kann samanlíknast við FAS Føroya Altjóða Skipaskráseting.

Vit hugsaðu er hettar lógligt, ja so kunnu vit einki gera við tað.

Og veruliga føla vit okk-um sum ein lítil minniluti av Føroya fólki sum verður happaður, snýtur í skatti og ikki er tað so sjáldan at ein fær at vita, at tú betalir ongan skatt. Men vit hava breiðan rygg, og vit vita eisini, hvat vit eru verdir fyri Føroya land á inntøkusíðuni.

Fyri at lýsa hvat DIS inntøka er, so er tað at sig at hon ein nettu løn, sum ein arbeiðir fyri og ikki ein brutto løn, sum er vanligt. Einasti munurin á einari nettu løn og ein brutto løn er, at har eru skattakrónur-nar tiknar áðrenn ein fær lønina og at tað, ið ein for-vinnur brutto ikki verður upplýst.

Nakað annað sum kann ein sigast um DIS er, at skattakrónurnar ikki fara til land og kommunur, men í lumman hjá reiðarínum. Hendan lóggávan var sam-tykt í Danmark í 1988 og ein millumlandaskatta-avtala varð skrivað ímillum Danmark og Føroyar um DIS inntøkuna, tað var nokk Jógvan Sundstein, sum var løgmaður tá.

Teir ið sigla undir DIS hava sostatt onga ávirkan á hesa lóggávu og vit vita ei heldur hvat stendur í henni, so tað hevði verið upp á sítt pláss, at fíggjarmálaráð-harrin kunnaði Føroya fólk um hesa lóggávu. Vit vilja biðja fíggjarmálaráðharran um at upplýsa okkum og Føroya fólki um hesa lóg-gávu bæði ta donsku og tað skjalið, sum bleiv undir-skrivað av Føroya løgtingið um DIS lóggávuna.

Fyri at lýsa hettar út í æsir skuldi Føroya Lands-stýri sett ein samfelagsser-frøðing fyri at fáa hansara meting og áskodan um.

Hvøn týdning DIS og DIS'arnir hava fyri tað føroyska samfelagið

Hvørjar avleiðingar vil tað hava, um fleir DIS'ara fara av landinum

Hvat er alheimsrákið fyri líknandi skipanir sum DIS

Vit hugsaðu hevur fíggj-armálaráðharrin hugsað seg um, hvat ið hann ger, allarhelst ikki tí.

Her eru nakrir sannir upplýsingar, sum eru frá TAKS fyri skatta ári 2007.

Í 2007 vóru 461 mans/kvinnur skrásettar undir DIS skipanin, búsitandi í Føroyum.

Hesir mans/kvinnur komu heim við eini útflutn-ingsvørau sum var 123 milliónir krónur, tað er hesa útflutningsvøru sum fíggjarmálaráðharrin ætlar at dubultskatta, ja ein kann spyrja seg sjálvan blíva hinar útflutnings vørðurnar skattaðar.

Fíggjarmálaráðharrin er á djúpum vatni, har hann ikki botnar, hann veit rætt og slætt ikki hvat í hendur um hann leggur eyka skatt omaná DIS inntøkuna.

**Nú í fleiri ár hevur verið tosað um, hvat ið gerast skal fyri at fáa tey ungu heim aftur. Vit kunnu siga við vissu, at hettar ikki fer at fremja nakra flyting av ungum fólki til Føroya, men heldur tvørturímóti, eina fráflyting.**

Vinnuháskúlin er fullur av ungum fólki, sum er í ferð við at útbúgva seg til at fara út í heimin soleiðis, at tey kunnu fáa til lívsins uppihald, men verða hesi búsitandi í Føroyum, ja Jóannes hvat hevði tú gjørt sjálvur, um tú var á teirra aldri. Vit vita, hvat vit høvdu gjørt, men eru ikki heilt vísir í hvat tú hevði gjørt.

123 milliónir / 461 = 269 túsin krónur, ikki ein so ovur-honds stór inntøka sjálvt um skatturin er farin av.

5% av 123 milliónum er 6,15 millión.

Lat okkum bara geva tær eitt lítið tal sum fer at flyta av landinum eini 70 mans/kvinnur.

70 x 269 = 18.8 milliónir, minni krónur í umfar í Føroyum, allarhelst verður hettar meira. Hettar er bara fólk í yngra endanum. So eru tað hinir sum hava siglt ein stóran part av lívinum, har eiga teir flestu børn, sum búgva uttanlands og hava búsett seg har, hesir fara at umhugsa at flyta adressu, og nemt er her, vit eru jú enn ein partur av Danmark, hvussu nógvir vita vit ikki, men ein pol kanning verður skjótt koyrd av bakkastokki, so skal tú nokk fáa tølini at vita, men tað eru fleiri.

Vit halda, at Føroya fólk og land er illa stilla við einum so snævursjygdum fíggjarmálaráðharra við róðrið, uttan mun til polit-iskan lit. Vælsignaður mað-ur tonk teg um árin tú fert enn longur út, har í tú ikki grynnur og eingin kann halda tær uppi. Fyri at siga tað við skeið beint út, so verður meira slýnkið í kassanum hjá tær Jóhannes.

Vit kunnu bert ugga okk-um við at fjøldin av politik-arum hava hugflogið í ordan.

Vit fara til síðst í hesum opna brævi til fíggjarmála-ráðharran at biðja um innlit í

**1.** Uppruna skjalið, ið umfatar DIS avtaluna
**2.** Skjøl viðvíkjandi DIS avtaluni undirskrivaði seinri
**3.** Lóggevandi skjøl við-víkjandi Arbeiðsmarknað-argjøldum sum umfata DIS avtaluna.
**4.** Eru DIS krónurnar inn-roknaður í blokkstuðulin, um ikki burdu tær, her skuldu kommunurnar eisini fingið sín part.

DIS skipanin kann saman-berast við fisk ið verður útfluttur, bert er tað tann munurin at DIS inntøkan verður útflutt á hvørjum árið, ja ein sildatunnu sum aldri blívur tóm.

Um so er at tú manglar hugskot til at spara á fíggjarlógini so kanst tú altíð skriva til antares@antares.fo og vit vilja koma við góðum ráðum, sum fara at virka at roynast í verkið.

Vegna nevndina og teir 130 limirnar í frítíðar felagnum Antares.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.